



Stórur áhugi var fyri grindini í gjár. 176 hval løgdu beinini

# Stór grind í Havn

**Nógv fólk fóru í bátarnar ella í sjógvin við Sandagerð, tá ið ein grind varð rikin inn í gjár. Drápið gekk væl, og grindin taldi 176 hvalir**

GRINDADRÁP

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kr. Vang*

Í gjár legði ein stór grind beinini í Sandagerði. 176 hvalir vórðu avlívaðir. Jákup Andreas Mohr er grindaformaður, og hann letur væl at drápinum.

– Grindaboðini komu klokkan 11.45. Hon varð funnin ein fjórðing úr Stongini. Klokkan 16 legði hon beinini í Sandagerði. Tað tók 12 minuttir at avlíva allar 176 hvalirnar, so tað gekk væl, sigur Jákup Andreas.

**Stórur áhugi**

Grindaformaðurin letur væl at fólkunum, sum luttøku í drápinum.

– Tað vóru royndir grindamenn, sum luttøku í drápunum. Alt gekk væl, men eg klári sjálvandi ikki at hava yvirlit yvir alt drápið. Eg haldi, at tað vóru um 2000 partar, og tað verða 0,6 skin í part. Tað er hampuligur partur í Havnini, sigur grindaformaðurin.

Tað vóru nógvir bátar úti, tá ið grindin varð rikin, men Jákup Andreas dugir ikki at siga, hvussu nógvir vóru.

– Sum sagt havi eg ikki yvirlit yvir alt drápið, men eg haldi, at áhugin var stórur, sigur hann at enda.





